## Starv á Hagstovuni

**Hagstova Føroya**

*er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins.*

*Stovnurin er í trimum deildum - Hagdeild, KTdeild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber.*

*Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT tøkningar og skrivstovufólk.*

*Hagstovan hevur tørv á fólki til fólkahagtøl, serliga íbúgvahagtøl, arbeiðsmarknaðarhagtøl og inntøkuhagtøl.*

*Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólk. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.*

*Besti førleikin er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og haraftrat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.*

*Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag. Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.mars 2004.*

*Set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800, vilt tú hava meira at vita um starvið.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Dagstovnurin við Botnánna**

er gamli frítíðarskúlin, ið er útbygdur soleiðis, at børn eisini ganga í barnagarði har. Í barnagarðinum ganga 20 børn og í frítíðarskúlanum ganga 25 børn.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin við Botnánna**
eftir einum pedagogi og einum hjálparfólki at starvast 30-35 tímar um vikuna, at byrja 1. apríl 2004.

Leiðari: Malan Jógvansdóttir, tlf. 421323 fartl. 221323
Botnávegur
410 Kollafjørður
frikoll@torshavn.fo

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. mars 2004.

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir tveimum pedagogum.
Eitt starv er 30 tímar um vikuna frá 15. mars 2004 og eitt er 30 tímar um vikuna frá 1. mai 2004

Í vøggustovuni eru 3 stovur við 12 børnum í hvørjari.

Vit bjóða tvey áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika til at gera sína ávirkan á stovnin.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- hevur góð samstarvsevni.
- ikki er bangin fyri at taka ábýrgd.
- er røkin, nærlagdur og álitandi.
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytan og tryggan dag við virðing fyri einstaka barninum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir á telefon 313131.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi seinast 01.mars 2004.

# Sosialurin
-tað loysir seg

## Várframsýningin 2004

verður í Listaskálanum
5.-28. mars

Øll eru vælkomin at senda inn listaverk til hesa framsýning, ið verður útvald og sett saman av eini dómsnevnd, ið felagið hevur sett.

Allar myndir skulu verða klárar at heingja upp.

Pappírsmyndir skulu verða í glas og rammu.

Tilmeldingarblað fæst við at venda sær til Listasavn Føroya, postsmogu 1141, 110 Tórshavn, tel 31 35 79, fax 31 66 79.

Seinasta freist at lata inn listaverk til Várframsýningina er sunnudagin 22. februar kl. 18.00

**FELAGIÐ FØROYSK MYNDLIST**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2641, Sp/f Faromar, 100 Tórshavn.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Johan Jan Albinus Dahl, Dalakrókur 15, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Linda Herdalur, 950 Porkeri.

*Skráseting Føroya tann 9. februar 2004*

*Kristin Balle*

PADI

## Grundútbúgving í kaving

Grundútbúgving í kaving verður í Eysturoy vikuskiftini
13. - 15. februar og 20. - 22. februar

Møguleiki verður at læna kavaraútgerð

Kava verður í turrdrakt!

Tilmelding: 21 89 29 ella j-joensen@post.olivant.fo

**Janus Joensen**
Kavara Instruktør

w w w . f a r o e d i v e . f o

Sosialurin 341800

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Landsins besta bilaleiga



**Ring: Tórshavn 313 535 ella flogvøllurin 358 800**

www.avis.fo · avis@avis.fo
Johs. Berg · Staravegur 1 · 100 Tórshavn

AVIS We try harder



Sjúklingahotellið Tórshavn

# Sjúkrasystir til Sjúklingahotellið Tórshavn

Vegna farloyvi søkir Sjúklingahotellið Tórshavn eina sjúkrasystir frá 1/5 til 31/11 2004.
Arbeiðstíðin er 37 tímar um vikuna í skiftandi vaktum við vikuskiftisvakt 3. hvørja viku.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir Familju- og heilsumálaráðnum.
Endamálið við stovninum er at hýsa føroyskum sjúklingum ið eru til viðgerð í Danmark og avvarðandi teirra.

**Arbeiðið fevnir millum annað um:**
- Vegleiðing, kunning og samrøður við sjúklingum og avvarðandi
- Samskipan við sjúkrahús innan H:S
- Sjúkraróktauppgávur
- Skrivstovuarbeiði

**Vit ynskja eina sjúkrasystir sum:**
- Hevur virkað sum sjúkrasystir í minst 3 ár.
- Hevur royndir innan bæði medicinska og kirurgiska viðgerð.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.

Við at venda tær til Inu Frisdahl leiðara á tele +45 21 67 72 90 fæst nærri kunning um starvið.

Løn og setanartreytir: Eftir avtalu millum DSR og Keypmannahavns Kommunu.

**Umsókn við avrit av skjølum skulu sendast til:**

**Sjúklingahotellið Tórshavn**
Tåsingegade 29, 5 sal
2100 København Ø
att. Umsókn

**Umsóknarfreist er 24. februar 2004 kl. 14.00**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Ergoterapeutur

Ergoterapiin á psykiatrisku deild søkir eftir ergoterapeuti til niðursett vikutímatal til okkara vælvirkandi toymi av ágrýtnum og positivum starvsfeløgum.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um arbeiði:**
Ergoterapiin viðger brúkarar frá øllum psykiatriskum deildum umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og ergoterapeutarnir hava ábyrgdina av hvør sínari deild.

Vit bjóða tær eitt spennandi starv, har arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar. Vit nýta m.a eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag, og arbeitt verður nógv við dokumentatión.

**Førleikakrøv:**
Tú skalt verða áhugað/ur í at luttaka í einari spennandi avbjóðing, kunna vísa áræði, ikki verða bangin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at útbyggja tværfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligir eginleikar so sum humor, greiða talu og gott arbeiðslag.

**Starvið** verður at seta skjótast gjørligt.

**Fleiri upplýsingar** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a fáast við at venda sær til Súnu Mørk, deildarergoterapeut tlf. 313540 lok. 426, ella Kirstin Ellingsgaard, leiðandi ergoterapeut tlf. 313540 lok. 217.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 25. februar 2004 kl. 12.00.

# Aðalfundur

**Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 28. februar 2004 kl. 13.00 á Platform í Havnar Klubba.**

**Skrá:**
1) Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2) Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar
3) Lógarbroytingar
4) Møgulig uppskot frá limum og nevnd
5) Ásetan av limagjøldum
6) Val av formanni
7) Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
8) Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi
9) Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 21. februar 2004.**

Uppskot til formann felagsins er:
**Gunnleivur Dalsgarð**
**Varðabú 32**
**100 Tórshavn**

**Starvsmannafelagið**

# Aðalfundur

**Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður beint eftir aðalfund Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba 28. februar 2004.**

**Skrá:**
1) Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskapari
2) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3) Viðtøkubroytingar
4) Val av nevndarlimum
5) Ymiskt

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 21. februar 2004.**

**Nevndin**

# Grannastevna

Samb. lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um grannastevnu v.m., verður boðað frá, at grannastevna fyri markatalsbygdina Dalur verður ætlandi

**hósdagin 11. mars 2004 kl. 19.00**
**í Eiriksgarði í Dali**

Innkomið mál: Reglugerð fyri lundafleyg í Dali.

Málið verður viðgjørt og atkvøtt verður samb. grannastevnulógini.

Møtir og atkvøður onkur fyri annan á grannastevnuni, ið hevur atkvøðurætt, krevst fulltrú frá viðkomandi, dagfest og undirskrivað av tveimum vitnum.

Á Sandi 9. februar 2004

**Ingibjørn Eldevig,**
sýslumaður

# Rørarbeiði

Vit átaka okkum at gera
- Hitaverksarbeiði
- Ventilatiónsarbeiði
- Sanitetsarbeiði

í høvuðsstaðarøkinum.

Tilboð verða eisini givin.

**Ring tlf. 225701 · 317901 · 210168**

# Til sølu

Nissan Primera í sera góðum standi, árg. 6/99.

Lagalig fígging.

FIAT BMW

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300